


*Arbeiðið hjá hesum trimum monnunum gongur alsamt framá, til stóra gleði fyri fólkið í býnum.*

## Tónleikur, drama og café

**Ungdómsmøti:** Tey ungu í missiónshúsinum Thabor eru eisini spent til stevnuna um vikuskiftið.

Í eina tíð hava tey fyrireikað seg við ymiskum spennandi tiltøkum í húsinum, nú so nógv fólk kemur til bygdina. Og á skránni fyri stevnuna sæst, at tey rættiliga fara at spenna seg út leygarkvøldið.

Tiltøkini í missiónshúsinum byrja kl. 21:30 við ungdómsmøti, har presturin, Bergur D. Joensen úr Havn talar. Á hesum møtinum fer dramabólkurin Nuntius at framføra eitt stykki, eins og kendi tónleikabólkurin Proclaim fer at spæla.

Seinni um kvøldið - kl. 00:30 - verður tónleikacafé, har Credo fara at spæla. Har verður eisini andakt og okkurt til matna.

**sb.**

# Eitt vakurt øki til mong endamál

**Frammanvert Mentanarhúsið verður nú gjørt eitt øki, sum í framtíðini kann gerast karmur um konsertir og fundir av alskyns slagi. Alt er ein partur av eini størri ætlan at fríðka um miðbýin**

FRÍÐKAN
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Uttan fyri Mentanarhúsið síggjast tríggir mans arbeiða henda vakra mánadag fyrrapart.

Teir hava fingið til uppgávu at fríðka økið oman fyri hetta húsið, sum um vikuskiftið fer at verða karmur um fleiri av tiltøkunum á varmakeldustevnuni.

Alt arbeiðið er í sjálvum sær so umfatandi, at tað ikki verður liðugt til stevnuna. Men tá alt arbeiðið er liðugt, verður her talan um eitt stórt og vakurt øki, sum er vælegnað til uttandura fundir, konsertir og mong onnur tiltøk (sí aðra grein um hetta í blaðnum).

Teir tríggir hava longu gjørt ein stóran part av arbeiðinum, og eru nú farnir at nærkast ovaru síðu av húsinum. Flisar og steinar verða lagdir við kønari hond, soleiðis at fólk í framtíðini skulu kunna fegnast um hetta økið.

At so veðrið henda mánadagin var av tí allarbesta gjørdi helst sítt til, at alt gekk eitt sindur lættari.

## Ymiskar royndir við felags uppgávu

Teir tríggir menninir, sum eru við í hesum arbeiðinum eru:

Rasmus Larsen úr Danmark, sum er útlærdur anlegsgartnari. Hann verður ætlandi í Føroyum til heystar.

Rólant Dam úr Havn, sum arbeiðir sum avloysari, áðrenn hann fer til Danmarkar at lesa víðari.

Kristian í Vági, sum er ættaður úr Leirvík, og sum í januar mánaði byrjaði at læra til anlegsgartnara hjá Búgva Róin, sum stendur fyri arbeiðinum.

## Fólkafundur á Varmakeldu

Gamalt er at fara út á Varmakeldu náttina millum 3. og 4. juli at drekka sær lekidóm úr heitu kelduni á staðnum. Gamli siðurin datt niðurfyri, men fyri uml. 55 árum síðani tók ítróttarfelagið í Fuglafirði upp aftur táttin at savnast úti á Varmakeldu varmakeldunátt. Tvey tey seinastu árini hevur eingin fólkafundur verið á Varmekeldu varmakeldunátt, men nú verður siðurin uppafturtikin.

Tiltakið á Varmakeldu í ár verður sum undanfarin ár við báli, felagssangi og røðu. Í ár heldur Uni Næs, prestur røðu. Aftan á røðuna verður vísa kvøðin. Høvi verður eisini hjá fólki at práta saman, syngja ella leska sær av kelduni.

Bussur fer frá Mentanarhúsinum kl. 23.

## Kappsigling við føroyskum seglbátum

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður kappsigling við føroyskum seglbátum á Varmakeldu 2005.

Kappingin byrjar sunnudagin 3. juli kl. 15.

Vanliga eru einar fimm kappingar árliga, fyri tað mesta í Sundalagnum og á Skálafirði. Vanliga plaga 20 — 30 bátar at verða við hvørja ferð.

Við hesari kappingini á Varmakeldu, verður roynt at skapa áhuga fyri kappsigling eisini í Fuglafirði og bygdunum har um leiðir.

Nr. 1, 2 og 3 fáa steyp.


